

## Ronaldo stóð læknaroyndina

Tað gerst alt meira víst, at Cristiano Ronaldo í næstum skrivar undir við Real Madrid. Í gjár var porugisiska stjørnan til vanligu læknakanningina í Madrid, og her funnu læknarnir einki, sum skuldi forða fyri einum skifti. Nú restar bert, at Real Madrid og Ronaldo semjast um persónligu treytirnar fyri sáttmálanum, áðrenn Real Madrid enn einaferð setir nýtt met fyri keypsprís av fótbóltsspælara.

## Aftur eitt Real-keyp

Real Madrid hevur enn einaferð styrkt sær um hópin. Hesa ferð hevur felagið keypt verjuspælaran, Raul Albiol, úr Valencia fyri 112 milliónir. 23 ára gamli spælarin hevur eisini verið eitt av transfer-málunum hjá Liverpool, men nú hevur hann so sett undirskriftina á ein fimm-ára sáttmála við kongaliga spanska felagið.

KÍ – ÍF 3-2 (2-2):

# KÍ er við aftur

KÍ

ÍF

**Tað sá einki út í Klaksvík fyri einari viku síðan. Men eftir sjey døgum og trimum dystum er KÍ av álvara við aftur, og nú eru ungu klaksvíkingarnir bara eitt stig frá áttanda plássinum**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Heðin á Lakjuni stendur við bóltin úti í høgru. Hann bíðar eftir floytuni hjá Peturi Reinert, sum fer at loyva honum at senda frísparkið inn í feltið við eyðkenda vinstra beininum. Og floytan ljóðar. Í brotsteiginum royna bláir klaksvíkingar við ymsum rennimynstrum at snýta mótstøðumannin. Og tað eydnaðst serliga hjá einum. Verjuleikaranum Jógvani Isaksen. Hann hevur í øllum førum ríkiligt at plássi, tá hann stýrir bóltinum móti málinum. Tað er tøgn á Injector Arena. Bólturin tekur í graslíkið, og Andras Gango í málinum hyggur bara at. So verður buldur úr skýlinum, sum ikki fekk ein enda fyrr enn tjúgu minuttir seinni. Isaksen hevur lagt KÍ á odda í tíðini, dómarin hevur lagt afturat. Trý stig afturat. Ger so væl.

Fótbóltshýrurin í Klaksvík var framúr í gjárskvøldið. Flaggskipið hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag hevur verið í tungum sjógvi í hesum kappingarárinum, og klaksvíkingar hava verið óttafullir. Tað vóru teir ikki í gjár, tá KÍ vann seg nærri áttanda plássinum og bjargingini í Vodafonedeildini.

### Ikki flott

Tey, ið høvdu rindað 70 krónur fyri at síggja dystin á Injector Arena í gjár, gjørdu tað neyvan í eini vón um flott fótbóltsspæl. Liðini eru í tyngra endanum av stigatalvuni, og í løtuni ræður tað fyrst og fremst um at stríða seg til stigini. Ikki tí. Í løtum stóðu bæði klaksvíkingar og fuglfirðingar fyri frálíkum fótbóltsspæli, men tað var als ikki tað, ið setti dagsskránna.

Gestirnir úr Fuglafirði vóru leikliga omaná í fyrra umfarinum. Serliga riggaði smáspælið væl á miðvøllinum, men tað var sjáldan, at ÍF veruliga setti Jákup Mikkelsen undir trýst.

Hjá heimaliðnum bar illa til. Miðvøllurin var lítið hjálpsamur í framrættaða spælinum, og oftast var loysnin at senda langar bóltar úr verjuni og fram á Stefan Kalsø, sum var einsamallur framherji. Niels Pauli Danielsen, sum var sera eyðsýndur á Argjum sunnudagin, hevði lítið at bjóða, og tí var Kristoffur Jakobsen ofta einsamallur. Men tað bilti ikki eftir einum korteri.

Tá setti hann brádliga ferð á í vinstru síðu, og tá hann slapp til baklinjuna, sendi hann fyri føturnar á Stefan Kalsø, sum stýrdi bóltinum í netið. Nenad Saric javnaði fyri gestirnar tríggjar minuttir seinni, men fimm minuttir fyri hálvleik bar aftur til hjá KÍ. Í triðja veruliga málmøguleikanum í dystinum, sendi John Hammer í síðunetið eftir innlegg úr høgru síðu. Men Balazs Sinkó javnaði aftur fyri gestirnar sera stutt undan hvíldini. Tá var hann tryggur av brotssteigarmarkinum eftir sera gott uppspæl í høgru.



*Ferðin og intensiteturin var í toppi. Og tá KÍ við seinasta sparinum í dystinum avgjørdi, var talan samstundis um dramatikk fyri allar pengarnar í Klaksvík*

*savnsmynd*

### KÍ er við aftur

Seinni hálvleikur var lítið skipaður. Serliga tók heimaliðið ferðina úr dystinum við nógvum fríspørkum, men dramatikkurin varð varðveittur, tí nógv stóð upp á spæl. Fáir møguleikar vóru, men í seinasta minuttinum riggaði hjá KÍ, tá Jógvan Isaksen tryggjaði klaksvíkingum øll stigini.

Nógv er broytt hesa seinastu vikuna. KÍ hevur lyft seg av aftasta plássinum og hevur langt um leingi fingið samband við ovaru liðini á stigatalvuni. Nú er summarsteðgur, og tað verður væntað, at nýggj andlit verða at síggja í hópinum. Eitt sindur harmiligt hjá ungu leikarunum, sum fara at standa í skugganum av teimum eldru. Men leiðslan kann ikki satsa, og noyðist at tryggja sær nýtt fólk í royndini at varðveita sætið í deildini.

ÍF er aftur í niðurflytingarvanda. Fuglfirðingar hava sjáldan veruliga verið við undurlutan, men tað sæst ikki aftur á stigatalvuni. Eftir summarsteðgin verður Rógvi Jacobsen aftur tøkur, og tað er vónin í Fuglafirði, at hann skýtur liðið aftur á rætta kós. Leikaratilfarið er betri enn til áttanda plássið. Úrtøkan hevur ikki verið nøktandi, og Jón Simonsen, venjari, er tískil trýstur í løtuni.

## NSÍ vann fyrsta dystin

**Hóast norska stórfelagið setti seg ímóti tí, hevur NSÍ fingið viðhald frá UEFA í ynskinum um at sleppa at spæla á heimavølli fyrst ímóti Rosenborg í UEFA Europe League-kappingini. Tí verður tað neyvan nakað eykalið, ið møtir NSÍ í Gundadali**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Av tí at bæði B36 og NSÍ stóðu til skula spæla heimadyst í somu kapping á sama vølli, ovara vølli í Gundadali, hevur NSÍ síðani lutakastið í Nyon mánadagin royndt at fingið býtt dystirnar hjá sær um.

So skjótt lutakastið var greitt, vendi NSÍ sær til ítróttarstjóran í Rosenborg, sum ljóðaði sinnaður at býta um, so NSÍ fekk heimadyst fyrst. Men tá hann hevði ringt heim til venjaran, var svarið eitt tvørt nei.

### Vildu helst spart stjørnurnar

– Sum skiltist á teimum, hevur Rosenborg nógvar dystir og eina tætta skrá, og tí lá illa fyri hjá teimum at býta um, sigur Jákup Vágsheyg, sum var eitt av NSÍ-umboðunum, tá lutakastið var mánadagin.

– Vit vendu okkum síðani til UEFA, fyri at fáa býtt um upp á dystirnar, og nú hava vit so fingið at vitað, at vit fáa fult viðhald frá teimum. Sostatt spæla vit heimadystin ímóti Rosenborg á ovara vølli í Gundadali hóskvøldið 2. juli klokkan 19 og útidystin eina viku seinni.